# Rimmar útsøla

byrjar tórsdagin 1. februar kl. 10.00

P/F Herluf B. Thomsen, Tvøroyri



Løgmansskrivstovan

## Fulltrúi/løgfrøðingur

Við hesum verður eitt starv sum løgfrøðingur á Løgmansskrivstovuni lýst leyst at søkja.

**Uppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjøllbroytt løgfrøðiligt arbeiði so sum gerð av løgfrøðiligum responsa, eftirkanning av lógaruppskotum hjá miðfyrisitingini og aðrar løgfrøðiligar uppgávur, eitt nú menning og samskipan av lóggávuarbeiðinum í miðfyrisitingini, og løgfrøðiligar arbeiðsuppgávur, ið standast av málinum um ríkisrættarligu støðu Føroya.

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava løgfrøðiligt embætisprógv. Tó kunnu eisini tey søkja, ið væntandi verða liðug við slíka útbúgving komandi summar.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar skulu harumframt hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna við tilhoyrandi stovnum og aðalstýrini.

**Vit kunnu bjóða**
Talan er um eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og við sera góðum møguleikum fyri eftirútbúgving.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við Rúna Joensen, deildarstjóra, tlf. 351010, fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

**Løgmansskrivstovuni**
Postsmogu 64
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi 16. februar 2001 kl. 15.00. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tvørvegis og samskipandi uppgávur, eitt nú landstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan og sjálvstýrismál.



KLAKSVÍKAR DAMPVASKARÍ



Umframt vasking av vanligum klæðum hava tygum nú møguleika fyri at fáa klæði tygara kemisk reinsað í okkara nýmótans reinsimaskinu.

Til dømis reinsa vit:
klædningar, buksur og jakkar, dýnujakkar, termodraktir (og onnur oljudálkað pløgg)

Tygum kunnu lata toy inn á hesum støðum:
Í Havn: »Seytjan« á Áarvegnum
Í Eysturoy: »Josi« á Skála, »Jungmann« í Runavík, »Rokoko« í Gøtu.

KLAKSVÍKAR DAMPVASKARÍ
Tlf. 455160 · 700 Klaksvík



Internet Sosialur in
www.sosialurin.fo



eyðun nolsøe & terji rasmussen
eitt nummar... og seytjan onnur

1 eros 2 tú 3 nummar 4 80'ini 5 lívið er okkara gáta 6 mítt land 7 ljóðmynd 8 dansa
9 handan mjørkan 10 tey dansa eins og skuggar 11 hvussu kann eg vita? 12 sjalusi
13 eg flýggi til tónleikin 14 maria 15 skuggar yvir peking 16 gerandislag 17 morgunflog 18 afrodite

3arin
SMS - tel 35 35 35 - fax 35 35 36 - e-mail: tryarin@post.olivant.fo





Stóra bringu
-ella lítla?

Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?

Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd. Ring til okkum og avtala tíð.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.

Vit hava eisini korsilett í stórum støddum

siri
lív & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610



Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650



# ítróttur

Nr. 20 • týsdagur • 30. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo




**Kyndil vann granna-uppgerðina**

Lesið miðsíðurnar

# Nýggjur landsliðsleikari

**Gøtumaðurin, Súni Olsen, ið spælir yrkisfótbólt í Hollandi, er nýggjur maður í landsliðshópinum, sum í gjár legði leiðina til Svøríkis**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*



*Orsakað av skaðum hevur Allan Si,monsen verið noyddur at gera nakrar broytingar í hópinum, sum í gjáramorgurnin fór við flúgvara til Danmarkar, haðani leiðin til Växjø*

Í mun til hópin, sum Allan Simonsen í farnu viku tók út til landsdystin móti Svøríki, eru nú framdar tvær broytingar, sum báðar stava frá skaðum.

Sum nevnt í farnu viku, so hevur Julian Johnsson brotið beinið, og fær tí ikki verið við á landsliðnum, og harumframt hevur Johan Byrial Hansen givið avboð, tí hann hevur fingið ein skaða.

### Nýggir menn

Ístaðin fyri hesar leikarar, hevur Allan Simonsen tikið út Andrew av Fløtum úr HB og Súna Olsen úr FC Zwolle. Hvørgin teirra hevur áður spælt í føroyska búnanum, tó at Andrew í Sveis taldist millum teirra, sum sótu samfullar 90 minuttir á beinkinum.

Um úttøkuna av Súna sigur Allan Simonsen, at talan her er um ein leikara, sum teir hava fylgt seinasta árið ella so.

– Eg havi ikki sæð hann spælt, meðan hann hevur verið í Hollandi, men Jógvan Martin (Olsen blðm.) og eg hava annars fylgt við gongd hansara seinasta árið ella so. Nú komu so nakrir skaðar, og harumframt hava eisini verið avboð frá øðrum leikarum, og tí hildu vit, at vit eins væl kundu geva Súna møguleikan nú.

### Nýtt lið

Um svenska liðið, sum føroyingar skulu spæla ímóti mikudagin, sigur Allan, at han stórt sæð ikki kennir nakað sum helst til liðið.

Úttøka hevur sjálvsagt eisini verið í Svøríki, og av hesum sæst, at talan meira enn nakað annað er um eitt lið av framtíðar landsliðsevnum. Tað, sum danir ofta kalla eitt ligalandslið.

Tað er nevnliga bert ein leikari, sum áður hevur roynt seg á liðnum, og tað er Håkan Svensson, sum tvær ferðir áður hevur verið í gula búnanum. Eingin av hinum leikarunum hava áður roynt seg í hesum høpi, og harumframt er talan í fleiri førum um sera ungar leikarar. Fleiri av hesum eru niðanfyri 20 ára aldur, so ivaleyst síggja venjararnir dystin sum eitt kærkomið høvi til at síggja, hvussu hesir ungu leikararnir standa seg í altjóða dysti.

Hvørt hetta so er ein fyrimunur ella vansi fyri føroysku leikararnar, er kanska eitt sindur ilt at meta um.

Tað er givið, at eitt svenskt lið við øllum teimum kendu útlendsku leikarunum ivaleyst hevði verið ein nógv størri biti fyri okkara. Ikki minst, tá hugsað verður um, at fleiri av hesum spæla fótbólt í deildum, har kappngin í løutni er í hæddini, meðan okkara menn bert hava vant í ein lítlan mánað, og tískil neyvan eru í fullari venjing enn.

Hinvegin er eisini hugsandi, at nýggju menninir fara at gera alt tað teir mentir, til tess at prógva, at teir veruliga eiga at roknast sum landsliðsevni framyvir.Tað skal tí ikki roknast við, at føroysku leikararnir á nakran hátt fáa ein lættan dyst, tí hóast okkara hava væl meira av royndum á altjøoa støði, so er einki at ivast í, at tá tað ræður um fótbóltsevnini standa svensku leikararnir einki aftan fyri okkara. Kanska er tað heldru tvørturímóti, men tað fáa so øll at siggja mikukvøldið.

**Svenski landsliðshópurin**

| | |
|---|---|
| Daniel Andersson | AIK |
| Andreas Isaksson | Djurgårdens IF |
| Håkan Svensson | Halmstads BK |
| Johan Wiland | IF Elfsborg |
| Erik Edman, | AIK |
| Mathias Florén | IFK Norrköping |
| Fredrik Karlsson, | IFK Göteborg |
| Benjamin Kibebe | AIK |
| Marcus Lindberg | Helsingborgs IF |
| Per Nilsson, | GIF Sundsvall |
| Olof Persson | Malmö FF |
| Jimmy Tamandi | Malmö FF |
| Gustaf Andersson | IFK Göteborg |
| Kennedy Bakircioglü | Hammarby IF |
| Kristian Bergström | IFK Norrköping |
| Tobias Grahn, | Lyngby FC |
| Petter Hansson | Halmstads BK |
| Christian Hemberg | Örgryte IS |
| Zlatan Ibrahimovic | Malmö FF |
| Stefan Ishizaki | AIK |
| Markus Johannesson | Örgryte IS |
| Kim Källström | BK Häcken |
| Mats Rubarth | AIK |
| Sharbel Touma | AIK |
| Christian Wilhelmsson | Stabaek Fotball |
| Patrik Anttonen, | Örebro SK |
| Mikael Dorsin | Djurgårdens IF |
| Thomas Magnusson | Trelleborgs FF |

**Føroyski landsliðshópurin:**

| | |
|---|---|
| Jens Martin Knudsen | NSÍ |
| Jákup Mikkelsen | Herfølge |
| Hans Fróði Hansen | B68 |
| Pól Thorsteinsson | Valur |
| Allan Mørkøre | HB |
| Øssur Hansen | B68 |
| Jóhannis Joensen | HB |
| Rógvi Jacobsen | KÍ |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ |
| Fróði Benjaminsen | B68 |
| Andrew av Fløtum | HB |
| Sámal Joensen, | Leiftur |
| John Petersen | Leiftur |
| Uni Arge | Akranes |
| Todi Jónsson | FCK |
| Kurt Mørkøre, | Sogndal |
| Súni Olsen | FC Zwolle |
| Óli Johannesen | Hvidovre |

Sosialurin -har tað hendir

# Skeivi spælarin skoraði

Hálvur føroyingur stjól myndina, tá ungur enskur áleypari ætlaði at seta søguligt met við málum í 11 dystum á rað.

18 ára gamli Bournemouth-áleyparin, Jermain Dafoe, hevði skorað 10 mál í 10 fylgjandi dystum, og um hann skoraði í dystinum móti Millwall um vikuskiftið, hevði hann sett enskt met.

Frammanundan eigur Ron Davies 34 ára gamla metið við málum í 10 dystum á rað.

Men bert eitt mál kom í dystinum, og tað gjørdi Claus Bech Jørgensen, sum harvið tryggjaði Bournemouth øll trý stigini.

Bournemouth nærkast nú fremstu liðunum í ensku 2. deild.

**ek**